Beinta Løwe Jacobsen
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur um COVID-19 kanningar, settur landsstýrismanninum í heilsumálum, Kaj Leo Holm Johannesen (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

1. Hvussu nógv hevur heilsuverkið/landið rindað higartil til privatu kanningarstovurnar fyri at taka sær av COVID-19 kanningum?
2. Nær fer sáttmálin millum heilsuverkið og privatu fyritøkurnar úr gildi?
3. Hvørja lógarheimild hevur Landssjúkrahúsið fingið til at útveita COVID-19 kanningar?
4. Hevur heilsuverkið lógarheimild til at biðja um at sleppa undan at gera kanningar av fólki?
5. Hevur landsstýrið spurt Heilsufrøðiligu starvsstovuna, um tey hava møguleika at taka sær av hesum kanningum?
6. Hvat er svarið hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni?

Viðmerkingar:

Fyri nøkrum mánaðum síðani kom fram, at Landssjúkrahúsið útveitti koronukanningar, so fólk mugu fara til privatar fyritøkur at lata seg kanna. Eisini kom fram at fólk, ið skulu kannast, skulu skráseta seg í skipanini hjá einari ferðamannaskrivstovu. Undirritaða hevur álit á privatu fyritøkunum, men undrast á framferðina hjá heilsuverkinum. Vit hava eitt alment heilsuverk í Føroyum, og tí er tað sera løgið, at heilsuverkið útveitir heilsuuppgávur.
Eisini kann tað undra, at Sjúkrahúsverk Føroya ikki gevur fólki annað val enn at brúka privatar fyritøkur, bæði tá tað ræður um at bíleggja tíð, gera potingar og til at útgreina kanningarnar. Tí er áhugavert at fáa svar upp á, um heilsuverkið hevur lógarheimild til at leggja hesar uppgávur út á privatar fyritøkur, og sostatt ikki geva fólki nakað annað val.
Eisini er áhugavert at vita, um Heilsufrøðiliga starvsstovan er spurd, og hvat svarið frá teimum er.
Í mun til fyrispurningin verður í høvuðsheitum hugsað um fólk, sum búgva í Føroyum, sum ikki neyðturviliga hava verið og ferðast, men sum av eini ella aðrari orsøk lata seg kanna fyri COVID-19.

Á Løgtingi, 11. desember 2020

Beinta Løwe Jacobsen